# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Allantina Jónsson**, vanliga nevnd Tina, úr Trongisvági andaðist á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi hósdagin, 81 ára gomul. Farið verður úr kapellinum sunnukvøldið kl. 18 í Tvøroyar kirkju. Jarðarferðin verður mánadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Tinu, kunnu lata Tvøroyrar kirkju eina gávu.

**Dánjal Hentze av Sandi** andaðist á Landssjúkrshúsinum hósdagin 11. september, 58 ára gamal.

**Dagurin**
**16. september. Eufemia**, deyð umleið ár 300. Kvinnuligur pínsluváttur, tikin av døgum undir Diocletianus keisara. Femja er konufólkanavn, sum hevur verið brúkt í Føroyum og eisini kemur fyri í nýggari tíð. Grikst navn sum merkir gott umdømi.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Robert Mcluckie sigur farvæl

## eftir meira enn 30 ferðir í Føroyum



Gamli Føroyavinurin, Robert Mcluckie úr Belfast, vitjar í Føroyum í hesum døgum. Hann verður her til mánadagin 06. oktober, tá hann flýgur aftur til Bretlands, og tá sigur hann, eftir øllum at døma, farvæl fyri seinastu ferð.

Hann sigur í einum brævi til nøkur vinfólk í Føroyum, at hann metir, at tá hann nú verður 80 ár í desember mánaða, so er rætt at gevast at ferðast so nógv sum hann hevur gjørt.

Hann hevur ferðast við evangeliinum í meira enn 55 ár. Hesi mongu ár hava leitt hann til nógv fjarskotin støð, sum m.a. Guyana í Suður Amerika og Cairo í Egyptalandi, sum hann hevur vitjað fleiri ferðir hetta langa tíðarskeið.

Hann er føddur og uppvaksin í nærheitini av Glasgow í Skotlandi, men hann og konan fluttu til Norður Írlands at virka í tænastu Harrans, har tey hava búð í mong ár. Tey hava ferðast nógv við orði Guds á katólsku Írsku oydni. Tey høvdu ein stóran húsbuss, sum tey ferðaðust við og sum tey nýttu sum miðstøð í andaliga verki teirra í Írlandi. Tey búgva framvegis í Norðurírlandi og ikki so langt frá onkrum av børnunum.

### Fyrsta samband við Føroyar

Robert Mcluckie fekk fyrstu ferð samband við Føroyar miðskeiðis í sjeytiárunum ígjøgnum Gunnar Gunnarson, sum um tað mundi arbeiddi í landsstýrinum. Gunnar ferðaðist nógv í útlondunum og møtti nógvum fólki av øllum slagi. Robert var eitt av teimum og teir gjørdust vinmenn fyri lívi, og tað var eisini Gunnar, sum leiddi meg á fyrsta sinni í samband við Mcluckie, tá hann spurdi meg, um eg kundi átaka mær at ferðast við honum í oyggjunum. Hetta gjørdi eg og eg kenni, at eg havi notið stóra signing av hesum í allar mátar.

Tá Robert hevði verið her á fyrsta sinni kendi hann, at Harrin legði honum á hjarta at vitja í Føroyum á hvørjum ári, og í ár hevur hann vitjað væl yvir 30 ferðir. Í fjørð stóðu hesi orðini at lesa um hann í einum av bløðunum: "McLuckie er væl lýddur í samkomunum í Føroyum. Hansara talur eru ikki akademiskir fyrilestrar, men ein greið framstilling av tí bíbliuteksti, hann velur at tala út frá. Dugir væl at fáa burtur úr tekstinum og at koma við persónligum og praktiskum anvendingum, sum er viðkomandi í dagliga kristna gerandislívinum."

### Møtiskrá

Hann kom til landi leygar-dagin 6. oktober, og tað fyrstu vikuna vitjaði hann samkomurnar í Norðoyggjunum. Í døgunum 14. september til 21. september verður hann ávíkavist í Eysturoynni og á Streymoynni, og í døgunum 28. september til 05. oktober vitjar hann í Suðuroy. Hesaferð kemur hann eisini at hava møti í bygdahúsinum í Famjin og í Skúlahøllini í Hovi.

Vit fara at heita á fólk um at møta talsterk til møtini, at siga øðrum frá og at biðja fyri møtunum og fyri bróðuri okkara, sum um 3 mánaðar, um Gud vil, trakkar út úr tí støvuta 10-áraskeiðinum og inn í 10-áraskeiðið har kempurnar ganga.

Øll eru hjartaliga vælkomin til øll møtini. Annars verða møtini lýst í bløðunum, í radio og á hesum heimasíðum: www.lindin.fo www.bkv.fo www.123.fo www.nebo.fo

Tey, sum ynskja at vit meiri um vitjanina og møtini eru vælkomin at seta seg í samband við undirritaða tlf. 448314 / 228314

**Poul Jóhan Djurhuus**
**Gjaranes@post.olivant.fo**

# Realskúlamynd



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndir er tikin yndir krígnum (uml. 1940-45). Næmingarnir hava verið í Gundadali til ítrótt, og eru á veg oman aftur í realskúlan saman við Jochumsen, lærara.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 185)

*Myndaeigari: Asbjørn Long*